TIL ARBEIÐIS

LAGT TIL RÆTTIS: Vilmund Jacobsen



FAKTA
**Navn:** Sonja J. Jógvansdóttir
**Starv:** Samskiftisráðgevi
**Staður:** Stoffalág 17, Tórshavn

# – Eg eri ógvuliga klossut

*- Eg brenni veruliga fyri starvinum, sum eg havi og vóni at kunna leggja nøkur ár aftrat í hetta arbeiði, sigur Sonja J. Jógvansdóttir, samskiftisráðgevi í Samtaki*

TAÐ VAR EIN **LØNARÓSEMJA** Á HEYSTI 2006 SUM GJØRDI, AT **SONJA J. JÓGVANSDÓTTIR** FRÁ DEGI TIL DAGS SEGÐI **ARBEIÐI** UPP OG SETTI SEG Í SAMBAND VIÐ **FIMM** ARBEIÐARAFELØG OG **SPURDI**, UM TEY IKKI HØVDU HUG AT SETA EIN **SAMSKIFTISRÁÐGEVA** Í STARV

Sonja J. Jógvansdóttir, sum er samskipari í Samtaki, vaks upp í Toftabønum í Fuglafirði saman við foreldrum sínum. Tvær systrar eru, sum eru ávikavist 6 og 15 ár yngri enn hon sjálv.

Tá Sonja var liðug við fólkaskúlan, fór hon beinleiðis á studentaskúla.

- Eg kundi hugsað mær at gjørt okkurt annað enn at farið í skúla, men tá var einki arbeiði at fáa. Hetta var í 1994, tá arbeiðsloysi framvegis var met høgt. Eg haldi, at meir enn helvtin av teimum, sum vóru í flokkinum á Kambsdali, vóru har av neyð. Í fleiri førum høvdu foreldrini sent tey, tí tað var einki arbeiði ella aðrir møguleikar fyri læru.

Sonja sigur, at sjálv forvann hon eitt sindur av peningi við at selja Sosialin í nøkur ár, og so plagdi hon viðhvørt eisini at sláa grasið hjá ommu síni. Tað gav eisini nakrar krónur, sigur hon brosandi.

- Eg var venjari hjá pinkum í fótbólti í nøkur ár, og eg spældi sjálv fótbólt frá tí, eg var 7, til eg var 18 ára gomul. Eg gjørdi eisini fimleik í tvey ár, tá fimleikarfelagið Flog var stovnað í 1989, men eg má viðganga, at innara fimleikagentan ikki ordiliga var til staðar, sum hon tekur til.

Brosandi heldur Sonja fyri, at hon er framúr klossut og hevur vánaligan balansa.

- So, tað hevur óivað sæð stuttligt út á fimleikaframsýningini, leggur hon aftrat.

### Størsta gleðin

Sonja sigur, at størsta gleðin hjá henni sum ung var at spæla horn.

- Eg var í musikkskúlanum, í ungdómsorkestrum og í Fuglafjarðar Hornorkestri. Eg spæli framvegis horn – tuba – og eg haldi, at hetta er eitt tað mest avslappandi tingið, ið finst. Tað næsta verður at læra meg at spæla el-bass. Havi fingið ljóðføri, onkrar lærubøkur, men eg havi ikki havt stundir. Tað verður betri, tá høvuðsumvælingin av húsunum er liðug, heldur hon fyri.

Eftir lokið studentsprógv, arbeiddi Sonja í hálvtannað ár í fiski hjá Føroya Fiskavirking í Havn og í Runavík. Hetta var, áðrenn hon fór at lesa.

- Føroya Fiskavirking var eitt gott arbeiðspláss, og eg havi enn samband við fleiri av starvsfeløgunum har. Arbeiðið á fiskavirkinum var eisini góður íblástur til at fara at lesa víðari.

Sonja nam sær útbúgving í stjórnmálafrøði við lærda háskúlan í Edinburgh.

- Meðan eg las, arbeiddi eg altíð í feriunum, serliga um summarið og á jólum. Eg arbeiddi í fiski, og eina summarferiu var eg á Ferðaráðnum. Hetta var eisini ótrúliga spennandi.

Eftir loknan lesnað starvaðist hon í nakrar mánaðir sum vikarur á Glyvrum, áðrenn hon fekk starv á Dimmalætting sum blaðfólk.

Síðan fór eg aftur at lesa, og í samband við lesnaðin var eg í starvsvenjing á sendistovuni í Brüssel, har eg eisini fekk arbeiði, sigur hon.

### Samskiftisráðgevi

Hvør var so leiðin hjá Sonju til at gerast samskiftisráðgevi í Samtaki?

- Tað var ein lønarósemja á heysti 2006 sum gjørdi, at eg frá degi til dags segði arbeiði upp og setti meg í samband við fimm arbeiðarafeløg, um tey ikki høvdu hug at seta ein samskiftisráðgeva í starv. Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag bitu á, og byrjaði eg í núverandi starvinum í desember í 2006.

Sonja sigur, at tey síðan settu seg í samband við Føroya Fiskimannafelag, sum fekk nýggjan formann um hetta mundið, og Samtak gjørdist veruleiki í apríl 2007.

- Eftirfylgjandi eru arbeiðarafeløgini í Klaksvík eisini komin við, og hetta er bara gott og styrkir um felagsskapin og feløgini í honum.

Sonja sigur, at arbeiði sum samskiftisráðgevi í Samtaki er ótrúliga spennandi og gevandi, og stundum er tað kanska í so spennandi, sum hon tekur til.

- Tú upplivir nógv og kemur í samband við nógv ymisk fólk kring alt landið. Hetta dámar mær sera væl. Eg kenni meg eisini hepna, tí eg havi framúr góðar arbeiðsumstøður, góðar leiðarar og rúmar ræsur í mun til arbeiðsinnihaldið, sigur hon.

Men hvussu sær Sonja so tíðina fyri framman?

- Eg hugsi ikki so nógv um framtíðina. Lív mítt er býtt upp í tvey ára skeið, og eg veit sum heild, hvar eg eri tvey ár fram í tíðina. Hetta gevur ein tryggleika og ger, at eg fái notið gerandisdagin til fullnar, sigur hon.

Er tað nakað serligt, tú brennur fyri?

- Eg brenni veruliga fyri starvinum, sum eg havi og vóni at kunna leggja nøkur ár aftrat í hetta arbeiði. Við hús er vanliga gongd í nógvum í senn, so frítíð, sjálvboðið arbeiði og arbeiði rennur mangan saman. Eg haldi kortini, at vit trívast við, at tað er soleiðis, hóast hetta kann merkja, at stundirnar at røkja familjusambond og onnur ting eru avmarkað. Tað havi eg eitt sindur ringa samvitsku av. Mær dámar ótrúliga væl at skriva, og vóni, at tað einaferð ber til at fara at skriva burturav, sigur Sonja J. Jógvansdóttir.